# Tað sær frægari út hjá toski, hýsu og upsa

## Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn 2014

**Fiskidaganevndin**

Juni 2014

**Tað sær betri út hjá toski, hýsu og upsa - Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn 2014**

Dennis Holm og Hertha Olsen, juni 2014

Fiskidaganevndin 2014.

**Innihald**


Fororð ........ 5

Samandráttur ........ 6

Tilgongd og veruleikafatan ........ 6

Náttúruviðurskiftini í broyting ........ 6

Støðan hjá toskinum er batnað ........ 7

Framhaldandi framgongd hjá hýsuni ........ 7

Støðan hjá upsanum er frægari í ár enn undanfarin ár ........ 7

1. Inngangur ........ 8

2. Háttalag ........ 9

2.1. Umboðan ........ 9

2.2. Evnið í samrøðunum ........ 10

2.3. Tilgongd og veruleikafatan ........ 10

3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg ........ 12

4. Náttúruviðurskifti og æti ........ 14

4.1. Æti – meiri lív í sjónum ........ 14

4.2. Støðan betri enn undanfarin ár ........ 15

5. Støðan hjá toskastovninum ........ 16

5.1. Støðan hjá toskinum er væl betri ........ 16

5.2. Toskurin góða stødd ........ 17

5.3. Toskurin er feitur ........ 18

5.4. Tilgongdin er betri ........ 19

5.5. Støðan hjá toskinum munandi betur ........ 20

5.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum er batnað ........ 21

6. Støðan hjá hýsustovninum ........ 22

6.1. Støðan betur enn í fleiri ár ........ 22

6.2. Fáa allar støddir – tað er gott ........ 23

6.3. Hýsan er feit ........ 23

6.4. Tilgongdin betri ........ 24

6.5. Støðan hjá hýsuni frægari ........ 25

6.6. Samanumtikið: Framhaldandi framgongd hjá hýsuni ........ 25

7. Støðan hjá upsastovninum ........ 26

7.1. Støðan hjá upsanum batnað ... 26
7.2. Fáa allar støddir av upsa ... 27
7.3. Upsin er feitur ... 27
7.4. Tilgongdin av upsa er ikki góð ... 28
7.5. Støðan hjá upsanum betri enn undanfarin ár ... 28
7.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum er frægari í ár enn undanfarin ár ... 29
8. Onnur fiskasløg ... 30
8.1. Brosma og longa ... 30
9. Fiskidagar ... 31

## Myndir

Mynd 1. Svar og skipabólkar ... 9
Mynd 2. Svar og reiðskapur ... 12
Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg (í tali). ... 13
Mynd 4. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella? ... 15
Mynd 5. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár? ... 15
Mynd 6. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til? ... 16
Mynd 7. Er fiskurin stórur ella? ... 17
Mynd 8. Er fiskurin feitur? ... 18
Mynd 9. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ... 19
Mynd 10. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár? ... 20
Mynd 11. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til? ... 22
Mynd 12. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella? ... 23
Mynd 13. Er fiskurin feitur? ... 24
Mynd 14. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ... 24
Mynd 15. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár? ... 25
Mynd 16. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til? ... 26
Mynd 17. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella? ... 27
Mynd 18. Er fiskurin feitur? ... 27
Mynd 19. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ... 28
Mynd 20. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár? ... 28
Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum? ... 31
Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum? ... 32
Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild, at talið av fiskidøgum hjá flotanum er? ... 32

## Fororð

Fjórða árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við føroyskar fiskimenn, sum fiska botnfisk undir Føroyum.

Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at gera tilmælið til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

## Samandráttur

Fjórða árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning við føroyskar fiskimenn. Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at gera tilmælið til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiárið.

Við svarum frá umboðum fyri 2/3 av skipunum í bólki 2 til bólk 4T og umboð fyri helvtina av útróðrarbátunum í bólki 5A, verður mett, at kanningin hevur eitt gott haldbari, og er eitt gott grundarlag til at kunna siga nakað um hvussu fiskimenn meta støðuna verða hjá fiskastovnunum, og hvussu náttúruviðurskiftini eru og hvussu hesi ávirka fiskastovnarnir.

## Tilgongd og veruleikafatan

Endamálið við samrøðukanningini við fiskimenn er at greina, tulka og seta orð á tey viðurskifti, sum fólk við dagligum yrki á sjónum uppliva støðuna í okkara høvuðsvinnu og náttúruni tey virka í.

Talan er um aðra tilgongd enn tær vísindaligu kanningarnar, vit vanliga kenna frá m.ø. Havstovuni, sum m.a. eru grundaðar á yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, og tá uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum. Tilgongdin handan samrøðukanningina er grundað á, at roynt verður at seta orð á tann veruleikan, sum fiskimenn dagliga uppliva í sínum yrki á sjónum.

## Náttúruviðurskiftini í broyting

Seinastu árini hava fiskimenn í árligu samrøðukanningini víst á, at broytingar í náttúruviðurskiftunum hava stóra ávirkan á fiskastovnarnir. Ein heilt stórur partur av teimum, sum hava luttikið í kanningini í ár, siga at broytingar í náttúruviðurskiftunum seinasti árini hava havt við sær vánaligar liviumstøður hjá fiskastovnunum undir Føroyum..

Fiskimenn eru á einum málið um, at tað er ikki ovurfisking, sum hevur ført við sær, at støðan hjá botnfiskastovnunum er vánalig. Víst varð í samrøðunum á, at tað í dag eru fá skip í vinnu samanborið við fyri árum síðani. Ein skipari staðfesti í hesum sambandi: *Ovurfisking kann tað ikki verða, tí so fá skip eru til fiskiskap, at vit síggja ikki eitt ljós á fiskileið.*

Víst verður á, at tað í fleiri ár hevur verið lítið av æti og at hetta hevur við sær vánaligar liviumstøður hjá fiskastovnunum. Í kanningini í ár vísa ein munandi partur av fiskimonnunum á, at støðan í ár er betur enn undanfarin ár – tað er sera nógv æti at síggja og at tað er nógv meiri lív í sjónum í ár enn undanfarin ár. Nógvir fiskimenn hava harumframt viðmerkt, at tað eru nógv ár síðani, at teir hava sæð so nógvan svartfugl sum í ár – og vísa til, at svartfuglurin er ein góð ábending um hvussu støðan er við føði í sjónum.

## Støðan hjá toskinum er batnað

Kanningin gevur greiðar ábendingar um, at støðan hjá toskinum er batnað í mun til støðuna seinastu árini. Fiskimenn lata væl at støðuni, nógv meiri er til av toski, og tilgongdin hevur verið betri enn undanfarin ár. Toskurin er eisini stórur og feitur, við góðum uppí blandi av smáum støddum.

## Framhaldandi framgongd hjá hýsuni

Samanumtikið vísir samrøðukanningin, at fiskimenn í ár lata væl betri at, tá umræður hýsuna. Longu í 2013 vístu fiskimenn á, at ein framgongd var at hóma, men í ár er tað ein greiður meiriluti av teimum, sum luttóku í kanningini, sum meta at støðan hjá hýsuni er hampiliga góð og væl betri enn undanfarin ár. Mett verður at tilgongdin hevur verið betri enn undan farin ár, allar støddir eru at fáa, og fiskurin er sum heild feitur.

## Støðan hjá upsanum er frægari í ár enn undanfarin ár

Samanumtikið er støðan hjá upsanum frægari í ár enn undanfarin ár. Meiri er til av upsa. Upsin er av góðari blandaðari stødd, og er feitur. Tilgongdin tykist tó framvegis ikki verða góð, hóast hon verður mett verða eitt vet betri enn í fjør.

# 1. Inngangur

Í januar 2014 vóru tað umleið 1.300 menn og kvinnur, sum vóru skrásett at hava fiskiskap sum sína høvuðsinntøku. Hetta er nakað lægri enn í 2013, tá tað vóru umleið 1.500 fiskimenn og –kvinnur, og 2012, tá tað vóru umleið 1.600 fiskimenn og –kvinnur. Og væl minni enn í 2011, tá tað við ársbyrjan vóru góð 1.700 fólk, sum høvdu fiskiskap sum sína høvuðsinntøku.

Ein partur av føroysku fiskimonnum og –kvinnum hava sítt dagliga yrki umborð á skipum, sum fiska botnfisk undir Føroyum. Yrki á sjónum gevur teimum møguleika at fáa innlit í hvussu støðan er hjá fiskastovnunum um hvussu náttúruviðurskiftini á og í havinum broytast og ávirka fiskastovnarnir.

Endamálið við samrøðukanning millum fiskimenn og –kvinnur er at savna vitan, um hvussu støðan hjá høvuðsfiskasløgunum undir Føroyum, um hvussu náttúruviðurskiftini eru, og hvussu fiskimenn og –kvinnur meta hetta ávirka fiskastovnarnir.

Dennis Holm og Hertha Olsen stóðu fyri kanningini, sum varð gjørd í mai og juni 2014.

## 2. Háttalag

Sum partur av arbeiðinum við tilmæli til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum, um fiskidagar, og hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár, hevur Fiskidaganevndin í mai og juni 2014 latið gjørt samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn.

Kanningin varð skipað sum ein samrøðu- og spurnablaðskanning. Tilsamans vórðu gjørdar samrøður við 61 fiskimenn. Samrøðurnar eru gjørdar við fólk, sum eru virkin umborð á skipunum. Í einstøkum førum eru samrøðurnar tó gjørdar við fólk, sum hava tilknýtið til skipið, t.d. reiðari ella hjálparfólk á landi.

Kanningin fevnir um samrøður við umboð fyri tilsamans 68 skip og bátar, 55 teirra eru í bólkunum 2 til og við 4T, meðan hini 13 eru útróðrarbátar í bólkinum 5A.

Samrøðurnar vóru skrivaðar inn í spurnablað og hareftir lisin inn í hagtalsforrit. Tær nógvu hundraðtals útgreiningarnar og viðmerkingarnar í samrøðunum vórðu síðani bólkaðar í evnir, sum eru ein týðandi partur í greiningini av kanningini.

### 2.1. Umboðan

Í juni 2014 vóru útskrivaði tilsamans 86 fiskiloyvir til skip í bólki 2, 3, 4A, 4B og 4T, og 25 loyvir til bólk 5A (og 468 til bólk 5B). Av teimum 86 skipunum í bólkunum 2 til 4T eru umleið 71 í vinnu.

Samrøður vórðu gjørdar við umboð fyri 55 skip í bólkunum 2 til 4T, og umboð fyri 13 útróðrarbátar. Samrøður vórðu sostatt gjørdar við umboð fyri meiri enn 2/3 av skipunum í bólki 2 til og við bólki 4T, og helvtina av útróðrarbátunum í bólki 5A.

Í myndini niðanfyri er gjørt upp hvussu býtið er millum skipabólkarnir í kanningini í mun til útskrivaði loyvir. Staðfestast kann, at samrøðurnar eru nøkulunda javnt býttar millum skipabólkarnir frá 2 til og við 4T. Sí mynd 1 niðanfyri.




*Mynd 1. Svar og skipabólkar*

Í flestu førum er samrøðan gjørd við skiparanum á bátinum/skipinum. 77% av svarunum eru givin av skiparanum. 15% av svarunum eru frá stýrimanni, meðan 8% av svarunum eru frá manning umborð á skipinum ella øðrum við tilknýtið til skipið.

Umboð fyri 2/3 av skipunum í bólki 2 til bólk 4T og umboð fyri helvtina av útróðrarbátunum í bólki 5A hava luttikið í kanningini. Út frá hesum verður mett, at kanningin hevur eitt gott haldbari, og er eitt gott grundarlag til at kunna siga nakað um hvussu fiskimenn meta støðuna verða hjá fiskastovnunum, og hvussu náttúruviðurskiftini eru og ávirkað fiskastovnarnir.

## 2.2. Evnið í samrøðunum

Evnini í samrøðunum fevndu um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, um náttúruviðurskifti og æti, harumframt varð eisini spurt um fiskidagatalið.

Eitt samrøðu-spurnablað varð brúkt sum grundarlag, tá kanningin varð gjørd. Í samrøðu-spurnablaðnum varð spurt um, hvørji høvuðsfiskasløgini hjá skipinum vóru, og síðani spurt um støðuna hjá hesum fiskasløgunum. Meiri nágreiniligt varð spurt um:

- Hvussu er støðan hjá (*t.d.*) toskinum – er nógv til?
- Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?
- Er fiskurin feitur?
- Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?
- Hvussu er støðan hjá (*t.d.*) toskinum í ár í mun til undanfarin ár?
- Eru onnur viðurskifti av týdningi, sum kunnu vísast á í smb. við (*t.d.*) toskin?

Umframt støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, varð eisini spurt um náttúruviðurskifti og æti, umframt at spurt varð um fiskidagatal hjá skipinum og fiskidagatal sum heild. At enda vórðu fiskimenn eisini bidnir um at seta orð á hvørja teir meta orsøkina verða til vánaligu støðuna hjá nøkrum av høvuðsfiskasløgunum undir Føroyum.

Spurningarnar í spurnablaðnum eru teir somu, sum brúktir eru undanfarin ár.

## 2.3. Tilgongd og veruleikafatan

Samrøðukanningin við fiskimenn er gjørd við tí fyri eyga, at lata fiskimenn sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, um náttúruviðurskifti og um æti.

Í mun til tær vísindaligu kanningarnar, vit vanliga kenna frá m.ø. Havstovuni, sum eru grundaðar á yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum, so er tilgongdin í samrøðukanningini grundað á, at roynt verður at seta orð á tann veruleikan, sum fiskimenn dagliga uppliva í sínum yrki á sjónum.

Talan er um tvær ymiskar tilgongdir í samband við at roynt verður at greina og meta um hvussu støðan hjá fiskastovnunum er og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Grundleggjandi er ikki

talan um at ein tilgongd er rættari ella meiri sonn enn onnur, hóast vit í kjakinum í Føroyum hava lyndið at velja at hava tiltrúgv til eina tilgongd fram um hina.

Endamálið við samrøðukanningini við fiskimenn er at greina, tulka og seta orð á tey viðurskifti, sum fólk við dagligum yrki á sjónum uppliva støðuna í okkara høvuðsvinnu og náttúrugivnu umstøðurnar, tey virka í.

## 3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg

Í hesum partinum verður hugt nærri at luttøkuni í kanningini, sæð í mun til við hvørjum reiðskapi skip og bátar royna við, og hvørji høvuðsfiskasløgini eru.

Tá luttøkan í kanningini verður býtt á reiðskap, so telur húkaflotin 62%, meðan trolarar telja 38%. Hetta samsvarar nøkulunda við veruliga býtið av fiskiloyvum, har ein munandi partur av loyvunum eru loyvi til húkaflotan, til línuskip, og línu- og útróðrarbátar.




*Mynd 2. Svar og reiðskapur*

Eins og í 2013, so er við í kanningini reiðskapurin langlína (eisini nevnd "trumla") ella filamentlínuna, sum er ein nylon-lína, har húkar verða heftir (klipsaðir) á línuna, samstundis, sum sett verður – í mun til vanliga línu, sum verður egnd antin á landi ella umborð. Skipini, ið fiska við filamentlínu seta umleið 2.000 húkar pr. samdøgur, meðan skip við vanligar línu seta umleið 16.000 húkar pr. samdøgur. Hartil eru húkarnir á filamentlínu væl størri enn húkarnir á vanligari línu.

Toskur og hýsa, og upsi eru týðandi fiskasløg hjá skipum og bátum, sum virkað undir FIskidagaskipanini. Harumframt eru tað fleiri skip, sum siga brosmu og longu verða týðandi fiskasløg.

Í mun til ymisku bólkarnir í Fiskidagaskipanini, so eru tað serliga trolararnir í bólki 2, sum fiska upsa. Toskur og hýsa er millum týðandi fiskasløgini hjá bæði húkaflotanum (bólki 3, 4A og 4B og 5A) og hjá trolarunum í bólki 2 og bólki 4T. Hjá bólki 3 eru brosma og longa týðandi fiskasløg. Hjá bólki 4T hava, umframt toskur, flatfiskur og havtaska týdning.




*Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg (í tali).*

Talvan skal lesast soleiðis, at talan er um fiskasløg, sum skipini siga seg fiska. Í samrøðukanningin varð spurt hvørji fiskasløg eru týðandi fyri einstaka skipið.

# 4. Náttúruviðurskifti og æti

Seinastu árini hava fiskimenn í árligu samrøðukanningini víst á, at broytingar í náttúruviðurskiftunum hava stóra ávirkan á fiskastovnarnir. Ein heilt stórur partur av teimum, sum hava luttikið í kanningini í ár, siga at broytingar í náttúruviðurskiftunum seinastu árini hava við sær vánaligar liviumstøður hjá fiskastovnunum.

Fiskimenn eru á einum máli um, at orsøkin til vánaligu støðuna hjá toskinum og hýsuni er ikki ovurfisking, men náttúrugivnu umstøðurnar, sum hava verið vánaligar seinastu árini. Víst verður á, at tað í fleiri ár hevur verið lítið av æti og at hetta hevur hevur við sær vánaligar liviumstøður hjá fiskastovnunum. Í ár tykist støðan tó verða betur, sí eisini niðanfyri.

Eisini varð í samrøðunum víst á, at hitin í sjónum er broyttur og at hetta hevur ført við sær innrás av pelagiskum fiskasløgum, sum so aftur hevur stóra ávirkan á botnfiskastovnarnir. Eisini varð víst á, at hitin í sjónum helst hevur ført við sær, at fiskurin ferðast annarleiðis í sjónum, enn hann vanliga hevur gjørt.

Fiskimenn eru á einum málið um, at tað er ikki ovurfisking, sum hevur ført við sær, at støðan hjá botnfiskastovnunum er vánalig. Víst varð í samrøðunum á, at tað í dag eru fá skip í vinnu samanborið við fyri árum síðani. Ein skipari staðfesti í hesum sambandi: *Ovurfisking kann tað ikki verða, tí so fá skip eru til fiskiskap, at vit síggja ikki eitt ljós á fiskileið.*

Leggjast kann afturat, at menn meta støðuna verða betri í ár, enn undanfarin ár (meiri um hetta niðanfyri).

## 4.1. Æti – meiri lív í sjónum

Í samrøðukanningini er hvørt ár spurt um, hvussu støðan er við æti, og um nógv lív er í sjónum. Hóast ábendingar eru um at støðan er betri í ár, enn undanfarin ár, so eru fiskimenn ymiskir á máli um hvussu støðan er. Ein av orsøkunum til fiskimenn eru ymiskir á máli um hvussu støðan er, at roynt verður á ymiskum leiðum.



*Mynd 4. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella?*

Eins og víst í myndini omanfyri, so bendir kanningin á, at støðan í 2014 er betri enn í 2013. Tað eru fleiri í 2014, sum vísa á at støðan er góð ella hampilig, enn tað vóru í 2013. Og tá spurt verður um hvussu støðan er í mun til undanfarna ár, so eru fiskimenn eisini positivir.

## 4.2. Støðan betri enn undanfarin ár

Ein munandi partur av fiskimonnunum vísa á, at støðan í ár er betur enn undanfarin ár. Í samrøðukanningini varð eisini í nógvum førum víst á, at tað er sera nógv æti er at síggja og at tað er nógv meiri lív í sjónum í ár enn undanfarin ár.




*Mynd 5. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár?*

Serliga verður víst á, at tað er væl meiri av nebbasild at síggja í magunum á fiskinum – og hetta meta menn verða eitt gott tekin. Eisini hava nógvir fiskimenn viðmerkt, at tað eru nógv ár síðani, at teir hava sæð so nógvan svartfugl sum í ár, vísandi til, at svartfuglurin er ein góð ábending um hvussu støðan er við føði í havinum.

Nakrar av viðmerkingunum er niðanfyri.

*Inniá er ikki nógv æti, men úti á er sera nógv. Havi ikki sæð so nógvan svartfugl í minst 30 ár. Skrivar uppundir vatnskorpuni. Royni innanfyri 100 favnar kurvuna.*

*Tað sær betur út, tað er meir lív í sjónum og meir svartfuglur er at síggja. Talan er eystanfyri – eitt tað besta í eini 5 ár.*

*Ikki fyrr enn í ár er ein farin at síggja nebbasild í fiskinum, tað hevur ein ikki gjørt í fleiri ár. Nógv lív í á feltinum, har er svartkjaftur, nebbasild, skittfiskur, hvítingsbróður, makrelur.*

## 5. Støðan hjá toskastovninum

Søguliga sæð er toskurin tað fiskaslagið, sum vanliga verið mett at verða týdningarmesta fiskaslagið, ið fiskað verður undir Føroyum. Góð toskaár hava stóran týdning fyri raksturin hjá botnfiskaflotanum, meðan vánalig toskafiskiskapur ávirkar skeiva vegin.

Í tonsum eru nøgdirnar av toski minkaðar ár um ár seinastu árini. Men hvussu meta fiskimenn støðuna hjá toskinum í 2014?

### 5.1. Støðan hjá toskinum er væl betri

Í samrøðukanningini í 2013 lótu fiskimenn illa at og mettu støðuna hjá toskinum verða ringa. 92% av teimum, sum luttóku í kanningini, søgdu í 2013 støðuna hjá toskinum verða ringa og lítið var til av toski.

Í 2014 er myndin ein onnur og lata fiskimenn væl betri at. Í mun til í 2013, tá 6% søgdu at støðan hjá toskinum var antin hampilig (ongin segði støðuna verða góða), so søgdu 71% av teimum, sum luttóku í kanningini í 2014, at støðan hjá toskinum er góð ella hampilig.

Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 6. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?*

Fiskimenn vísa á, at toskurin er stórur og feitur – og at tað sær frægari út við toskinum. Í samrøðunum varð eisini víst á, at støðan hevur verið ring, men at tað nú sær væl frægari út. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Allar støddir eru at fáa. Og fiskurin er so sera feitur. Støðan er batnandi og betur enn í fjør.*

*Fáa 100 pund upp á stampin, og tað er langt síðani at vit hava fingið so nógv upp á stampin. Heldur meir av toski enn av hýsu.*

*Støðan hjá toskinum er góð, tað er nokk til. Vit fáa allar støddir og væl av stórum toski. Toskurin eystanfyri er feitur, vestanfyri er hann rak. Í ár setur væl til av smáum toski, so støðan er betri enn undanfarin ár.*

*Nógv meiri til av toski, enn tað hevur verið. Allar støddir, góður toskur. Toskurin er sera væl fyri. Fyri 3 árum síðani var nógvur smáfiskur, nógv meir toskur nú enn seinastu 10 árini*

*Tað er meir at fáa av toski. Frægasti mai mánaði í 12 ár – helvt um helvt toskur og hýsa, og eg fái um 100 pund pr. stamp.*

*Støðan við toskinum er hampilig og betri enn í 2013. Fiskurin er størri – haldi tað er betri enn í 2013 og tað er orsaka av náttúruviðurskiftunum, sum eru betri.*

*Støðan hjá toskinum er batnandi – tað hevur verið vánaligt seinastu 5 árini. Fáa blandaða stødd, meir smátt enn tað hevur verið. Samanlíknað við seinastu 5-6 árini er nógv meir til av toski.*
*Nú kunnu vit fáa 500 kassar í 4 dagar, tað er langt síðani at ein fekk tað.*
*Síggja nógv meiri nebbasild enn vit hava gjørt*

## 5.2. Toskurin góða stødd

Í 2010 og 2011 varð nógv fiskað av smáum toski og varð í samrøðukanningini í 2011 eisini víst á, at fiskurin tá var miðal-stødd og smáfallandi. Síðani er støðan broytt og seinastu trý árini er í samrøðunum víst á, at toskurin sum heild er stórur – hetta framgongur eisini greitt í myndini niðanfyri.




*Mynd 7. Er fiskurin stórur ella?*

Í viðmerkingunum varð eisini víst á, at hóast toskurin sum heild er góða stødd, so er tað nú væl meiri smátt uppí. Nakrar viðmerkingar eru niðanfyri.

*Gott slag, meir smáfallandi nú enn tað var fyrr í ár.*

*Støðan hjá toskinum er uppgangandi. Toskur er góða stødd, men har eisini nógv smátt uppií. Toskurin er góður í mun til undanfarin ár.*

*Støðan hjá toskinum er góð, tað er nokk til. Vit fáa allar støddir og væl av stórum toski. Toskurin eystanfyri er feitur, vestanfyri er hann rak. Í ár setur væl til av smáum toski, so støðan er betri enn undanfarin ár.*

*Ein broyting er, ein fær allastaðni eitt sindur av toski.*

## 5.3. Toskurin er feitur

Eins og í fjør, so er tað breið semja millum fiskimenn, at toskurin er feitur. 70% siga at toskur er feitur (hesi vísa eisini á, at toskur er stórur ella miðal-stórur). Góð 25% siga toskin verða miðal feitan, meðan 4% siga toskin ikki verða feitan.




*Mynd 8. Er fiskurin feitur?*

Í mun til undanfarin ár, so vístu fleiri í samrøðunum á, at teir nú síggja nógv meiri nebbasild í magunum á toskinum enn fyrr – og hetta meta menn verða eitt gott tekin. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Síggja nógv meir nebbasild enn vit hava gjørt.*

*Ikki fyrr enn í ár er ein farin at síggja nebbasild í fiskinum, tað hevur ein ikki gjørt í fleiri ár.*

*Nebbasild er nógv av, tað er gott tekin.*

## 5.4. Tilgongdin er betri

Í samrøðukanningini í 2013 vóru fiskimenn á einum máli um, at tilgongdin var ring, tá 74% av teimum, sum luttóku í kanningini, søgdu tilgongdina verða ringa, meðan 18% søgdu tilgongdina verða hampiliga og 2% søgdu tilgongdina verða góða.

Kanningin í 2014 vísir greitt, at fiskimenn meta støðuna verða væl betri enn í 2013. Í kanningini í 2014 vísa tilsamans 41% av teimum, sum luttóku í kanningini, at tilgongdin er hampilig (37%) ella góð (4%), meðan 45% siga tilgongdina verða ringa.




*Mynd 9. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Fiskimenn vísa í samrøðuna á, at tilgongdin er betri og at tað er nógv meiri smátt, enn tað hevur verið fyrr.

Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Tað er frægari við toskinum enn tað hevur verið. Fáa blandaða stødd, bæði stórt og smátt.*
*Tað er ein ávís tilgongd, tað er langt síðani at fiskaríið er blivið frægari út á árið, men soleiðis er í ár.*

*Tilgongdin er frægari nú, hendan góða gongdin byrjaði í 2014.*

*Støðan hjá toskinum er góð, fáa meir og meir tosk. Tað er gott slag og blandað stødd. Frægasta tilgongd í langa tíð í heyst 2013 og vár 2014.*

*Generelt er støðan vánalig, men ikki verri í ár enn onnur ár, heldur frægari í ár.*

## 5.5. Støðan hjá toskinum munandi betur

Seinastu tvey árini hava fiskimenn víst á, at støðan hjá toskinum bara er versnað, men í ár er onnur meiri jalig mynd av støðuni. Ein stórur meiriluti av teimum, sum luttóku í kanningini vísa á, at støðan er góð ella hampiliga góð, tá samanborið verður við undanfarin ár. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 10. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?*

Í samrøðunum vístu fiskimenn eisini á, at støðan hjá toskinum í ár er betri enn undanfarin ár. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Allar støddir eru at fáa. Og fiskurin er so sera feitur. Støðan er batnandi og betur enn í fjør.*

*Støðan við toskinum er hampilig og betri enn í 2013. Fiskurin er størri – haldi tað er betri enn í 2013 og tað er orsaka av náttúruviðurskiftunum, sum eru betri.*

*Støðan hjá toskinum er blivin betur seinasta árið.*

*Støðan hjá toskinum er góð, tað er nokk til. Vit fáa allar støddir og væl av stórum toski.*

*Støðan er góð samanlíkna við fleiri ár undan, men ikki gott toskaár álíkavæl. Seinast í 1990´unum var nógv meir toskur enn nú.*

## 5.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum er batnað

Kanningin gevur greiðar ábendingar um, at støðan hjá toskinum er batnað í mun til støðuna seinastu árini. Fiskimenn lata væl at støðuni, nógv meiri er til av toski, og tilgongdin hevur verið betri enn undanfarin ár. Toskurin er eisini stórur og feitur, við góðum uppí blandi av smáum støddum.

## 6. Støðan hjá hýsustovninum

Í fleiri ár hevur støðan hjá hýsustovninum verið vánalig. Í 2013 vístu fiskimenn tó á, at støðan tóktist nakað betur, og í ár eru eisini greiðar ábendingar um, at støðan í 2014 er betri enn undanfarin ár.

### 6.1. Støðan betur enn í fleiri ár

Í samrøðukanningini vístu fiskimenn á, at tað er ávís framgongd at hóma hjá hýsuni. Í 2012 vístu 85% á, at støðan hjá hýsuni var ring. Støðan í 2013 var eitt vet frægari. Og í ár vísa fleiri enn 60% av teimum, sum luttóku í kanningini, at støðan hjá hýsuni er góð (7%) ella hampilig (56%). Og tað eru munandi færri enn undanfarin ár, sum vísa á at støðan hjá hýsuni er ring. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 11. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til?*

Í samrøðunum varð eisini víst á, at støðan hjá hýsuni er væl betri enn hon hevur verið. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Støðan hjá hýsuni blívur bara betur, og vit gera góðar túrar nú. Langt síðani at vit hava havt lønandi túrar í apríl. Tað høvdu vit í ár.*
*Allur fiskur gongur uppi í sjónum í dag, annarleiðis enn fyrr.*

*Sær út til at ganga rætta vegin. Sær gott út. Nógv meir at fáa í summar enn seinastu 2-3 árini. Blandað stødd í 2014 og 2013. Árini undan var bara stór hýsa.*

*Fær meir av hýsu enn man hevur fingið, men tað eru ikki rok-ár. Sær rímiliga gott út. Veiðitrýstið hevur ikki verið so stórt.*

## 6.2. Fáa allar støddir – tað er gott

Í mun til kanningina í 2011, so hava kanningarnar seinastu trý árini víst, at tað eru fleiri tekin um framgongd í hýsustovninum. Eins og í 2013 vísa fiskimenn í ár í samrøðunum á, at støddirnar eru meiri blandaðar og at smáur fiskur aftur er at fáa. Nakrar viðmerkingar eru niðanfyri.




*Mynd 12. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

> *Nógv smá hýsa at síggja, og nógvur ungfiskur at síggja. Meir hýsa er at fáa, og allar støddir, fleiri árgangir, so tað er gott. Fiskurin er væl fyri.*
>
> *Støðan hjá hýsuni er frægari enn í fjør. Fáa allar støddir.*

## 6.3. Hýsan er feit

Eins og í 2013, so eru fiskimenn samdur um, at hýsan er feit. Ein heilt stórur partur av teimum, sum fiska hýsu, siga hýsuna verða feita ella miðalfeit. Heilt fá, og færri enn í fjør, siga hýsuna ikki verða feita.




*Mynd 13. Er fiskurin feitur?*

## 6.4. Tilgongdin betri

Eisini tá umræður tilgongdina, eru fiskimenn meiri jaligir í ár í mun til undanfarin ár. Fyri fyrstu ferð síðan 2011 vísa nakrir fiskimenn á, at tilgongdin er góð. Tað eru eisini fleiri í 2014 enn undanfarin ár, sum siga tilgongdina verða hampiliga, samstundis sum væl færri siga tilgongdina verða ringa.




*Mynd 14. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

*Tað sær betur út við hýsuni. Vit fáa nú allar støddir, meðan tað fyri 3 árum síðani bert var stór hýsa at fáa. Vit hava fingið sera nógv av hýsu seinasta árið. Umleið helvtin av tí vit hava fingið, hevur verið hýsa.*

## 6.5. Støðan hjá hýsuni frægari

Broytingin til tað betra í samband við metingar um hvussu støðan hjá hýsuni er, gongur eisini aftur tá hugt verður at hvussu fiskimenn svara uppá spurningin um hvussu støðan er hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár.

Í kanningini vísa tilsamans útvið 60% á, at støðan hjá hýsuni er góð (23%) ella hampilig (56%) í mun til undanfarin ár, og kann staðfestast, at tað eru heilt greiðar ábendingar um, at fiskimenn meta støðuna hjá hýsuni verða betur í 2014 enn undanfarin ár.




*Mynd 15. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár?*

## 6.6. Samanumtikið: Framhaldandi framgongd hjá hýsuni

Samanumtikið vísir samrøðukanningin, at fiskimenn í ár lata væl betri at, tá umræður hýsuna. Longu í 2013 vístu fiskimenn á, at ein framgongd var at hóma, men í ár er tað ein greiður meiriluti av teimum, sum luttóku í kanningini, sum meta at støðan hjá hýsuni er hampiliga góð og væl betri enn undanfarin ár. Mett verður at tilgongdin hevur verið betri enn undanfarin ár, allar støddir eru at fáa, og fiskurin er sum heild feitur.

## 7. Støðan hjá upsastovninum

Størsti parturin av upsanum í Føroyum verður fiskaður við troli, men tað eru tó eisini einstakir størri og smærri útróðrarbátar, sum fiska upsa.

### 7.1. Støðan hjá upsanum batnað

Upsin hevur í nøgd verið tað botnfiskaslagið, sum hevur verið fiskað mest av tey seinastu árini. Fiskiskapurin er tó minkaður seinastu árini.

Í samrøðukanningini í 2013 vístu fiskimenn eisini á, at støðan hjá upsanum varð versnað seinastu árini. Í ár tykist støðan verða broytt nakað. Tað eru fleiri av teimum, sum luttóku í kanningini, sum siga støðuna hjá upsanum verða góða – ongin segði hetta í 2013. Í ár eru tað fleiri enn í fjør, sum siga støðuna verða ringa.




*Mynd 16. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til?*

Í samrøðukanningini settu fleiri fiskimenn orð á støðuna hjá upsanum. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Upsin er væl fyri, nógv betur enn undanfarin ár. Tað eru allar støddir at fáa, men minst av smáum. Tó er nógvur smáur upsi á Munkagrunninum. Støðan í ár er góð, men hevur verið vánalig. Í ár fáa vit nógv í gýtingartíðini, og tað heldur á.*

*Støddin á upsanum er góð og væl blandað við ungfiski. Hava verið í tí vánaligasta fiskarínum í nógv ár, men har er bati at síggja, tilgongdin í ár hevur verið góð.*

*Fleiri ár undan hesum, er upsafiskiskapurin bara versnaður. Í ár sær eitt sindur frægari út.*

*Tað er ikki nógv til. Tað hevur verið vánalig 2-3 ár. Støðan í ár: Nakað tann sami tendensurin í ár sum í fjør, kanska meir í ár enn í fjør.*

## 7.2. Fáa allar støddir av upsa

Seinastu árini er farin fram ein broyting í støddini av upsanum. Í 2011 var talan um eina góða blanding av støddum á upsanum. Í 2012 var upsin sum heild smáfallandi, tó miðalstórur upsi var í millum. Í 2013 var aftur ein hampiliga góð blanding av støddum. Og í ár, í 2014, vísa fiskimenn eisini á, at teir fáa allar støddir, bæði stóran og góðan upsa og gott uppí bland av ungfiski. Hetta meta menn verða eitt gott tekin.




*Mynd 17. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

## 7.3. Upsin er feitur

Eins og undanfarin ár, er breið semja millum tey, sum hava luttikið í kanningini, at upsin er feitur. Í ár siga eitt vet fleiri, at upsin er feitur, og eitt vet færri at upsin er miðalfeitur – um samanborið verður við 2013. Ongin segði at upsin ikki var feitur.




*Mynd 18. Er fiskurin feitur?*

## 7.4. Tilgongdin av upsa er ikki góð

Hóast fiskimenn vísa á, at støðan við upsanum er betri í ár enn í fjør, so verður í ár eins og í 2013 mett, at tilgongdin av upsa hevur ikki verið góð. Í kanningini vísir ongin á at tilgongdin er góð. Nakað fleiri enn í 2013 vísa í ár á at tilgongdin er hampilig, meðan nakað færri í ár siga tilgongdina verða ringa.




*Mynd 19. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

## 7.5. Støðan hjá upsanum betri enn undanfarin ár

Ein greiður meiriluti av teimum, sum hava luttikið í kanningini, siga at støðan hjá upsanum er betri í ár enn undanfarin ár. Í samrøðunum varð eisini víst á, at støðan í ár er batna, eftir at hon hevur verið vánalig seinastu 2-3 árini. Fiskimenn lata sum heild betri at upsanum. Meiri er til, teir fáa blandaðar støddir og fiskurin er feitur.




*Mynd 20. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár?*

### 7.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum er frægari í ár enn undanfarin ár

Samanumtikið er støðan hjá upsanum frægari í ár enn undanfarin ár. Meiri er til av upsa. Upsin er av góðari blandaðari støðd, og er feitur. Tilgongdin tykist tó framvegis ikki verða góð, hóast hon verður mett verða eitt vet betri enn í fjør.

# 8. Onnur fiskasløg

Í kanningini varð eisini spurt um støðuna hjá øðrum fiskasløgum, og verða hesi viðgjørt í hesum partinum.

## 8.1. Brosma og longa

Eins og undanfarin ár, so eru tað fleiri skip sum í størri mun fiska brosmu og longu, nú fiskiskapurin eftir toski og hýsu er minkaður. Talan er serliga um skip í húkaflotanum – bólkunum 3, 4A og 4B – sum fiska á djúpum vatni.

Í samrøðukanningini varð víst á, at støðan hjá brosmuni er hampiliga góð. Brosman er av góðari støðd og fiskurin er feitur. Mett verður at tilgongdin hevur verið hampiliga góð. Eisini verður víst á, at tað hevur týdning, at norðmenn ikki hava fiskað brosmu seinastu árini, orsaka av makrelstríðnum (sum nú er av). 18 skip siga brosmuna verða eitt av teirra týðandi fiskasløgum.

Eins og við brosmuni, so varð í samrøðunum víst á, at støðan hjá longuni er góð. Tað er nógv feit og góð longa til, og nógv føði er at síggja í longuni. Mett verður eisini at tilgongdin hevur verið hampiliga góð. Fiskimenn vísa eisini á, at tað hevur havt jaliga ávirkan á longuna, at norðmenn ikki hava fiskað longu seinastu árini. 23 skip siga longu verða eitt av teirra týðandi fiskasløgum.

## 9. Fiskidagar

Í samrøðukanningini varð spurt um viðurskifti viðvíkjandi fiskidøgunum. Spurt varð um einstaki báturin/skipi hevur nokk av fiskidøgum, um bólkurin hevur nokk av fiskidøgum, og um hvussu talið av fiskidøgum hjá flotanum er sum heild.

Seinastu fimm árini er talið av fiskidøgum minkað við fleiri enn 7.000 døgum. Minkingin í fiskidøgum hevur havt ávirkan á dagatalið hjá øllum bólkum í fiskidagaskipanini.

Tá spurt verður um báturin/skipið hevur nokk av fiskidøgum, so er greitt, at fiskimenn ikki eru á einum málið um hvussu støðan. Orsøkin er sjálvsøgd tann, at nøkur skip meta seg hava nokk av fiskidøgum, onnur at tað er á einari leið við talinum av fiskidøgum, meðan onnur siga seg hava ov lítið av døgum.

Í kanningini í ár eru tað fleiri sum siga seg hava nokk ella nøkulunda nokk av fiskidøgum, samanborið við undanfarin ár. Harumframt eru tað eisini færri sum siga ikki hava nokk av fiskidøgum. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum?*

Í samrøðunum varð víst á, at sum fiskiskapurin var nú, so var fiskidagatalið sum heild á einari leið, tó ein partur av flotanum sigur seg hava ov fáar fiskidagar. Fiskimenn eru ivasamir hvørt talið av fiskidøgum er nøktandi, um fiskiskapurin verður heilt góður aftur.

Tá spurt varð um bólkurin hevði nokk av fiskidøgum var heldur ongin greið semja. Nakað færri (24%) søgdu í ár enn í 2013 (31%) at bólkurin hevði nokk av fiskidøgum. Nakað fleiri (40% í mun til 28% í 2013) søgdu at fiskidagatalið hjá bólkinum var nøkulunda. Meðan 33% søgdu at bólkurin hevði ov fáar fiskidagar. 3% søgdu annað. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum?*

Tá spurt varð um, hvussu talið av fiskidøgum hjá flotanum sum heild er, svaraðu tilsamans 45%, at talið av fiskidøgum var gott ella nøkulunda, hetta er nakað færri enn í 2013, tá 58% søgdu at fiskidagatalið var gott ella nøkulunda. Fleiri søgdu í ár – 30% í mun til 25% í 2013 – at samlaða fiskidagatalið var ov lágt. Meðan 23% søgdu annað. Í mun til undanfarnu kanningar, so vístu 2% í ár á, at fiskidagatalið hjá flotanum er ov høgt.




*Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild, at talið av fiskidøgum hjá flotanum er?*

Leggjast kann afturat, at tað eru fleiri viðurskifti, sum ávirka talið av fiskidøgum og spurningin um talið er nøktandi fyri skip og skipabólkar. Seinastu árini er talið av skipum í Fiskidagaskipanini minkað munandi, meðan dagarnir eru fluttur til skip, sum eru í vinnu. Harumframt er fiskiskapurin broyttir í fleiri bólkum, har skip og bátar í størri  mun royna á ytri leið. Fiskidagaskipanin er samansett soleiðis, at fyri bólk 2, 3, 4A, 4B og 4T telja fiskidagar á ytri leið 3:1. Eitt línuskip í bólki 3, ið roynir eftir longu og brosmu og svartkalva á ytri leið, skal sostatt á ytri leið fiska 3 dagar fyri, at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini. Somu viðurskifti eru galdandi fyri skifti av reiðskapi frá línu til snellu hjá bólki 4A og 4B, har fiskidagarnir telja 2:1. Ein útróðrarbátur í bólki 4A á snelluveiðu skal sostatt fiska í 2 dagar, fyri at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini. Hesi viðurskifti hava ávirkan á, um talið av fiskidøgum er nøktandi ella ikki.

,